# Røða til veðurlagsverkfallið 24. januar 2020

Góðu áhoyrarar

Í Føroyum eru tvær upprunablómur: Reyð várhagasólja og føroyaskøra. Reyða várhagasóljan er týnd í náttúruni, men hon finst millum annað enn í føroyska garðinum á Debessartrøð.

Hartil hava vit nakrar aðrar blómur, sum eru sera sjáldsamar, og sum bert vaksa á einum stað, og tað er lyngjavni, kalmansbørkubóndi og lítil bjølluvísa. Sjáldsama vátlendismýggjagrasið vaksur, har tað er vátt, meðan kalmansbørkubóndin vaksur í mosalendi. Hesar báðar seinastu hoyra til børkubóndaættina.

Heimurin hevur tríggjar stórar trupulleikar at berjast við í dag: Hann er vorðin heitari, plastdálking - sum hjá okkum kemur frá alivinnuni, og minkandi margfeldi í náttúruni.

**HITI:** Tað er so lætt at siga, at bara tí tað verður heitari sunnanfyri, ella tí tað regnar meira onkra aðra staðni, so nýtist tað ikki at hava nakra serliga ávirkan her hjá okkum; men einki kundi verið meira skeivt, tí náttúran kring knøttin er sum skræddaraseymað - alt í henni hóskar saman. Skeiklar náttúran eitt vet, fer nógv av lagi.

Sjáldsomu blómurnar í hæddini, so sum rótmikil dreymsólja, bogin ævibolóma, vetrarlilja og fjallabládepla, klóra seg longur og longur upp, eins og tær í Alpunum, og tær verða tær fyrstu, sum fara at hvørva, um tað fer at verða nøkur fá hitastig heitari enn vanligt.
Sama ger seg galdandi við vátlendismýggjagrasinum - tað fer eisini at hvørva, um tað fer at verða turrari í veðrinum enn vanligt.

Hava vit terra ella skerping fleiri mánaðir á rað, ávirkar tað eisini seyðin, sum fær minni at eta, tí tá verður alt niðurbitið. Tað ávirkar so okkara heiðafugl og ternurnar, sum ikki fáa fjalt reiðrini nóg væl, og úrslitið er so, at egg og ungar verða etnir av seyðinum. Reiv- og ormverur, sum er føðin hjá heiðafuglinum, hvørva eisini, tá tað er skerpingur.

Okkara flytifuglar, sum til dømis spógvi, ferðast ofta frá leiðum sunnan fyri Sahara, og fáa teir ov lítið at eta á ferðini, gongur bara afturá hjá teimum. Tað sama ger seg galdandi við flogkyktunum, sum eisini bara ganga afturá.

**INNFLUTNINGUR:** Vit innflyta allan lo.. uttan nakað eftirlit. Graslíki, bilar, urtapottar við mold og alt møguligt annað, sum ofta er fult av kyktum og øðrum óynsktum verum. Onkur skipar enntá fyri plantutúrum til til dømis Skotland, har fólk so kunnu keypa plantur, sum tey taka við heim til Føroyar, uttan nakað eftirlit av nøkrum slag.

Seinastu árini hava vit, sum øll munnu vita, innflutt bæði flatmaðk, morsnigil, vespu, humlu og onnur kykt, sum ikki hoyra heima í Føroyum. Alt er til ampa fyri okkara margfeldi; men ofta sær man ikki trupulleikan, fyrr enn nøkur ár eru farin.

Nógvar blómur ella plantur verða innfluttar til Føroyar, og nakrar verða eisini innsløddar. Innsløddar merkir, at fólk antin hava tikið tær við sær við vilja, ella av óvart. Onkur innflutt er síðani komin út í náttúruna at vaksa, har hon trívist alt ov væl, og tí kann gera stóran skaða á upprunavøksturin, sum kann hvørva, ansar man ikki sera væl eftir. Hesar kallar man innrásnar ella "invasivar". Aloftast leggur man ikki til merkis innrásnu skaðaplanturnar, fyrr enn tað er ov seint. Tær innrásnu trívast ofta betri enn okkara upprunaplantur, tí tær eru vanar við sterkari fíggindar - nakað sum upprunaplanturnar ikki eru, og tí verða hesar við undirlutan. Tær innrásnu eru eisini oftast nógv størri enn upprunaplanturnar, sum tí køvast undir hesum sterka fíggindanum.

Í Havn sær man nógvar vespur og humlur; men so gott sum onga blómuflugu, tí vespan hevur dripið tær. Fer man ein túr til Suðuroy, sær man nógvar blómuflugur, tí har er eingin vespa - enn.
Hvussu hetta fer at ávirka okkara upprunablómur í longdini, vita vit ikki enn; men vit vita, at seinnu árini eru innfluttar plantur sum garðaskøra og fuschia farnar at breiða seg nógv meira enn áður. Fuchsian hevur nógv fleiri fræ enn fyrr - helst vegna vespurnar og humlurnar, og man sær hana so gott sum alla staðni - hon sæst enntá hanga í nærum hvørjum bergi.
Tað ger tað ikki betri, at Tórshavnar kommuna setur hana niður alla staðni.

Fræ hava tað við at flyta seg, og fleiri aðrar innfluttar havaplantur síggjast eisini aftur í náttúruni.

Flatmaðkurin etur reyðmaðkin, so bæði tjøldrini, kvørkveggjurnar og stararnir ganga svong. Helst er hetta eisini ein av orsøkunum til at tjaldrið hevur so stóra afturgongd. Nakra staðni kring landið er afturgongdin hjá tjaldrinum heili 80%.

Námsvespan hevur nú breitt seg um alt landið - tað er ormveran hjá henni, sum etur bløðini av birkitrøum kring landið.

Pílurin kann eisini skjótt verða hóttur, tí frostspannarin er eisini farin at breiða seg um alt landið.

**TAÐING:** Umframt at taðing undan alivinnuni hevur sett síni grefligu spor nógva staðni í landinum, hevur taðingin allarhelst eisini dripið svarta trøllakampin, sum bara vaks á einum stað, sum var undirdýkt við laksaslógvi í 2015.
Enn hava flestu av blómunum yvirlivað taðingina; men nú verður loyvt at taða alt árið. Um ættin so bara vendur "skeivan veg" ein dag, meðan taðað verður, kunnu vit missa okkara allar sjáldsamastu blómur sum kalmansbørkubóndan, lyngjavnan, lítlu bjølluvísuna, vetrarliljuna, sjáldsama undirslagið av bláklokku og fleiri aðrar við.

Nú verður eitt biogassverk bygt, sum skal framleiða tøð av neytamykju frá landbúnaðinum og lívrunnum burturkast frá alivinnuni. Men hvat ætlar man at brúka øll tøðini til? Enda tey í náttúruni, verður tað ein katastrofa, tí landið er alt ov lítið til so stóra nøgd av tøðum - ella lorti.

**DÁLKING:** Uttan himpr byggja vit dýrar havnir, sum kunnu taka móti risastórum ferðamannaskipum, harav fleiri ikki sleppa inn í aðrar havnir, tí tey dálka ov illa. Ferðafólkini umborð gera sum alt annað í náttúruni - leita í ein norðan undan hitanum sunnanfyri, og hendan gongdin fer bara at halda fram og vaksa í árunum, sum koma. Ferðafólkini kunnu verða ein hóttan móti okkara upprunavøkstri, tí tey kunnu ikki vita, hvørjar blómur tey skulu ansa eftir ikki at traðka niður, tá tey ganga í náttúruni, tí ikki ein einasta blóma ella planta er friðað í Føroyum.
Umframt at skipini hunddálka okkara nærumhvørvi, kunnu tey hava nógv umborð, sum vit helst ikki skuldu sæð aftur á landi.

Longu í 2008 kannaðu granskarir á Svalbard 259 pør av skóm hjá gestum, sum komu til oynna. Teir funnu 1019 blómufræ undan 53 plantusløgum, og av teimum vóru 88% ikki skrásett í Svalbard frammundan. Í miðal hevði hvør vitjandi 4 blómufræ undir skógnum, tey gingu í.

Eg tori ikki at hugsa um, hvussu nógv fremmand blómufræ verða dragsaði í land av ferðamannaskipunum. Og fer man at hugsa um øll kyktini, sum kunnu vera umborð, missir man svøvnin.

Rættiliga nógv kykt koma eisini til Føroyar við føroyingum, sum hava hildið feriu sunnanfyri, og sum so síggja ymiskar fremmandar verur mala runt í húsinum nakrar dagar aftaná, tey eru komin heim. Fremmandir gestir, sum vitja Føroyar, hava sjálvandi líka nógvar "aðrar gestir" í viðførninginum, og økta ferðingin millum lond er helst orsøkin til at veggjalús, sum man hoyrdi ommur og abbar fortelja um í gomlum døgum, nú aftur er vorðin vanlig í Føroyum.

**VANTANDI NÁTTÚRUVERND:** Enn hava vit onga Náttúruverndarlóg, og tíverri haldi eg, fólk alt ov ofta velja at blunda, tá pengar eru upp á spæl. Og her hugsi eg fyrst og fremst um føroyskar politikarar, sum kundu gjørt nakað munagott fyri okkara umhvørvi. Frammanundan hvørjum vali lova teir gull og grønar skógir; men tað er gloymt aftan á valið - tá verður blinda eygað hjá flestu av teimum vent móti allari dálking og øðrum umhvørvisskaðandi virksemi her á landi.

Eg haldi tað er so syndarligt, at vit kunnu missa nógvar av okkara undurføgru upprunablómum, áðrenn tey flestu av okkum læra tær at kenna.

Náttúran og umhvørvi er grundarlagið fyri at vit framhaldandi kunnu liva og virka í Føroyum, og tað eiga vit at hugsa um, áðrenn atlit verður tikið til vinnuna - og ikki umvent, sum er siður her á landi.
Hvat gera vit, tá alt er oyðilagt av berum vansketni?

**AT ENDA:** Orsøkin til at eg vísi á norskar kanningar og ikki føroyskar, er tí so lítið er kannað í Føroyum. Okkara politikarar hava ongantíð hildið tað verið neyðugt at veitt nóg nógva fígging til nakað, sum hevur við føroysku náttúruna at gera.

Gott vikuskifti

*Marita*

Blómur, nevndar í greinini:



**Lyngjavni** *Lycopodium annotinum* L.



**Kalmansbørkubóndi** *Orchis mascula* (L.)



**Vátlendismýggjagras** *Hammarbya paludosa* L. O. Kuntze (*Malaxis paludosa* (L.) Sw.)



**Hjartatvíbløðka** *Listera cordata* (L.) R. Br



**Bogin æviblóma** *Omalotheca supina* L. (DC) (*Gnaphalium supinum* L.)



**Bláklokka** *Campanula rotundifolia* var



**Fjallabládepla** *Veronica alpina* L.



**Vetrarlilja** *Pyrola minor* L.



**Svartur trøllakampur** *Aspleniaceae adiantum-nigrum* L.



**Garðaskøra** *Alchemilla mollis*



**Fuchsia** *Fuchsia magellanica*

Keldur:

http://jenskjeld.info/blomster.htm

http://jenskjeld.info/artikler/Gongdin-hja-aedu-teista-og-heidafugli-i-nolsoy.Froedi2019.pdf

https://www.tandfonline.com/doi/pdf/10.1080/00063658809476989

https://www.ibtimes.com/killer-sheep-discovered-wolfing-down-bird-chicks-2685744

https://uit.no/nyheter/artikkel?p_document_id=261176&p_dim=88205

http://jenskjeld.info/artikler/Namsvespuormverur-i-bloedunum-a-dunbjarkar-og-sitkaelristroeum-i-foroyum.Froedi2019.pdf

https://www.nrk.no/finnmark/lauvmakken-frostmaler-sprer-seg-mot-arktiske-strok-og-odelegger-traer-og-krattskog-pa-varangerhalvoya-1.14721572

https://partner.sciencenorway.no/forskningno-fram-centre-norway/warmer-winters-in-svalbard-are-not-good-for-plants/1461727

Ofta er tað trupult at taka myndir av okkara upprunablómum

